## Tingmenn hjá sambandsflokkinum hava ikki spælt ærligt spæl

**Heðin Mortensen sigur, at tað, sum er hent í sambandsflokkinum hesar seinastu dagarnar, líkist einum kvetti. Men tað fer at koma flokkinum aftur um brekkur**

LANDSSTÝRISMENN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta fer at koma okkum aftur um brekkur.

Tað heldur Heðin Mortensen.

Hann hevur verið løgtingsmaður fyri sambandsflokkin, men varð ikki afturvaldur hesuferð.

Og hann dylir ikki fyri, at eftir hansara tykki er tað ein vanlukka fyri sambandsflokkin, at hann ikki hevur fer at hava landsstýrismann úr Suðurstreymoy í hesum valskeiðnum.

– Suðurstreymoy er nógv størsta valdømi í landinum. Her býr ein triðingur av øllum veljarunum og tað er ein taktiskt mistak av teimum stóru, at sambandsflokkurin ikki hevur landsstýrismann úr Suðurstreymoy, sigur Heðin Mortensen.

Hann heldur, at tað verður ógvuliga tungt at vinna álitið á flokkin aftur í Suðurstreymoy og tað heldur hann fer at kosta flokkinum nógvar atkvøður á næsta løgtingsvali.

Samstundis er Suðurstreymoy fullkomiliga slept upp á fjall og tað fer at merkjast aftur, tí tað skerst ikki burtur, at illviljin ímóti Suðurstreymoy er stórur ímillum aðrar politikarar, tí her skal bara onki fremjast. Tí hevur tað stóran týdning at verja økið og tað gerst bara við sterkari umboðan.

### Líkist einum kvetti

Heðin Mortensen heldur, at tað, sum er farið fram innanfloks í sambandsflokkinum hesar seinastu dagarnar, líkist mest av øllum einum kvetti, har tað eru ávísir tingmenn, sum hava sligið seg saman um egin áhugamál.

– Tað kann so ikki vera við atliti at, hvat er best fyri sambandsflokkin, at Johan Dahl og Bárður Nielsen skulu manna flokkin í Tinganesi.

– Her hava persónlig viðurskifti gjørt seg galdandi, heldur hann.

Hann ivast ikki í, at hetta er ein liður í einum taktikki, sum varð lagdur til rættis beinanvegin, samráðingarnar um nýggja samgongu byrjaðu.

– Tað sæst týðiliga av, at virkandi formaðurin í flokkinum las onga undirtøku fekk frá sínum floksfeløgum til at verða landsstýrismaður.

– Tað sæst eisini við, at sambandsflokkurin miðvíst fór eftir teimum málsøkjum, sum hóskaði best til Bárð Nielsen og Johan Dahl.

Samstundis varð dentur lagdur á at fáa løgtingsformannin, sum ikki hevur nakran politiskan týdning.

Heðin Mortensen heldur, at tað hevði verið rættari at bjóða fólkaflokkinum løgtingsformanninum, sum fegin vildi hava hann og so sett upp á at fingið tríggjar landsstýrismenn ístaðin.

– Eftir tí, sum er komið fram, vóru tað eisini tríggir tinglimir, Bárður Nielsen, Johan Dahl og Edmund Joensen ið slógu seg saman um, hvør skuldi í landsstýrið og at Edmund Joensen skuldi verða løgtingsformaður.

– Men tað hevði tænt flokkinum betri at sett Kaj Leo Johannesen til fiskimálaráðharra.

– Í ítróttinum hava vit eitt hugtak, sum nevnist »ærligt spæl«. Tað haldi eg, at ávísir tinglimir í sambandsflokkin um kundi lært eitt sindur av, leggur hann afturat.

Er orsøkin til at tú sigur hetta ikki tann, at varð Kaj Leo settur í landsstýrið, so hevði tú sloppið aftur í Løgtingið?

– Eg veit, at tað fer at verða uppfatað soleiðis. Men tað hevði heldur ikki verið órímiligt, um eg kom aftur á ting. Eg hevði hóast alt 400 atkvøður, men verðið kortini settur uttanfyri. Nú verða umboð vald á ting við nøkrum og 70 atkvøðum.

– Sostatt havi eg ein stóran veljaraskara aftanfyri meg og tað er ikki bara eg, sum verði vónbrotin. Tað eru eisini allir mínir veljarar og síðani tíðindini bórust, hava hundraðtals fólk vent sær til mín at geva vart við sína ónøgd, sigur Heðin Mortensen.

# Søguligt formansval



*Aldursforsetin, Sverre Midjord, setti tingfundin. Her fær hann vegleiðing frá Súsonnu Danielsen og Edmundi Joensen*

**Fyri fyrstu ferð nakrantíð varð tingformaðurin einmælt valdur av Føroya Løgtingi. Hergeir Nielsen, Vilhelm Johannesen og Óli Breckmann halda fram í formansskapinum í løgtinginum**

TINGIÐ SETT
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Klokkan tíggju týsmorgunin setti aldursforsetin, Sverre Midjord nýggja tingið. Á skránni var góðkenning av valbrøvum og val av tingformanni og formanskapi. Ikki heilt óvæntað varð Edmund Joensen afturvaldur sum tingformaður.

Allir 32 tinglimirnar atkvøddu fyri Edmundi og okkum kunnugt er tað fyrstu ferð í søgu Føroya løgting, at tingformaðurin verður einmælt valdur. Seinastu 80 árini hevur Føroya løgting valt tingformannin.

– Eg eri ótrúliga fegin um at verða afturvaldur. Serliga fegin eri eg um, at eg varð einmælt valdur og tað taki eg sum eitt herðaklapp frá bæði samgongu og andstøðu frá farna tingskeiði, sigur Edmund Joensen

Afturat Edmundi Joensen í formansskapinum, vórðu Hergeir Nielsen, Vilhelm Johannesen og Óli Breckmann allir afturvaldir. Hergeir Nielsen er fyrsti næstformaður, Vilhelm Johannesen annar og Óli Breckmann triðji næstformaður.



### Heidi og John nýggj

Øll 32 andlitini, sum Føroya fólk valdi á ting 20. januar, møttu á fyrsta tingfundinum. Tinglimirnir hjá Tjóðveldisflokkinum møttu øll í føroyska búnanum. Av teimum 32 tinglimunum, vóru tað bert tjóðveldistingkvinnan, Heidi Petersen og javnaðartingmaðurin, John Johannessen, sum aldri áður hava verið á tingi.

Siðvenjan er at aldursforsetin setur nýggja tingið. 70 ára gamli javnaðartingmaðurin, Sverre Midjord, er elsti tingmaður og tí fall tað honum í lut at seta tingið.

*Óli Breckmann er royndasti tinglimurin. Seinni í ár kann hann hátíðarhalda 30 ára dagin á Føroya Løgtingi*





*Bert tríggir kvinnur vórðu valdar á ting 20.januar. Her eru tær avmyndaðar í gongini í Løgtinginum, f.v. nývalda Heidi Petersen, Lisbeth L. Petersen og Annita á Fríðriksmørk*

# Jørgen formaður í tingbólki Fólkafloksins

**Og harvið er Jørgen Niclasen eisini næstformaður Fólkafloksins**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Jørgen Niclasen verður nýggjur formaður í tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum. Hóast Anfinn Kallsberg, floksformaður, nú verður partur av tingmanningini, so verður tað ikki hann, sum verður formaður í tingbólkinum.

– Vit hava ta skipan, at formaðurin í tingbólkinum er tann organisatoriski formaðurin hjá flokkinum. Anfinn Kallsberg er floksformaður, sigur Jørgen Niclasen.

Formaðurin í tingbólki Fólkafloksins er samstundis næstformaður í Fólkaflokkinum – og tí er spurningurin nátúrligur, um Jørgen Niclasen hervið er krúnprinsurin hjá Anfinni Kallsberg.

– Nú ganga vit ikki so høgt upp í hatta við prinsum, men soleiðis hava vit nú valt at býtt arbeiðið, sigur Jørgen Niclasen.

Jørgen Niclasen er 35 ára gamal. Hann varð valdur á ting í 1994. Men hann hevi eisini fast sæti á tingi fyri Svend Åge Ellefsen, sum var landsstýrismaður frá 1991-1993. Hann var eisini inni sum varamaður fyri tað í 1989 – sum einans 20 ára gamal.

Jørgen Niclasen gjørdist eisini landsstýrismaður í 1998, tá John Petersen noyddist at leggja frá sær, og hann sæt í landsstýrinum, til hann sjálvur noyddist at leggja frá sær 15. januar í fjør.

Hóast ungur, so hevur Jørgen Niclasen longu drúgvar royndir í politikki – og tí er hann kanska eitt veruligt boð upp á nýggjan formann, tá Anfinn Kallsberg einaferð leggur formansstarvið frá sær.



*Fyrrverandi tíðindamaðurin, John Johannessen tók fyri fyrstu ferð sætið á tingið fyri Javnaðarflokkin týsmorgunin.*



*Her er so nýggja tingið. Á fremstu røðu siggja vit umboðini hjá Tjóðveldisflokkinum í føroyskum búna*